# 40.000 laksar rýmdu

Sunnunáttina varnaðust menn á alistøðini Akva Farms Vartdal í Noregi, at nógvur laksur var sloppin úr ringunum, og kanningar morgunin eftir vístu, at umleið 40.000 laksar vóru slopnir til rýmingar. Talan er um laks, sum vigar í meðal 2,2 kilo. Alistøðin hevur varskógvað myndugleikarnar um óhappið, og teir hava givið fólki loyvi til at fiska tann rýmda laksin. Frá alistøðini hava myndugleikarnir fingið at vita, at laksurin hevur ikki fingið heilivág, og at heldur eingin sjúka er ávíst á støðini.



*Fólk hava fingið frítt at fiska laksin (Mynd: Fiskaren)*

*Orð og myndir:*
*Jan Müller*



treffa sálarfrøðing, sum kundi kurera ein fyri flogræðslu. Umframt at kunna keypa alskyns vørur kundu tey vitjandi eisini fáa lívsstílviðgerð av ymsum slag og sunnan og góðan kost.

Fyrireikararnir siga við Sosialin, at royndirnar frá hesum báðum fyrstu lívsstílstevnunum hava verið so mikið góðar, at tær nú fara undir at fyrireika ta triðju stevnuna. –Høvdu vit bara havt eina enn størri høll, so høvdu vit kunnað gjørt stevnuna uppaftur meira fjølbroytta og spennandi siga tær báðar Annika og Ása, sum vit eisini kenna so væl frá teimum mongu ráðstevnunum og skeiðunum, ið Synergi so ótroyttiliga leggur til rættis gjøgnum alt árið.

Hoyrið meira til Lívsstílstevnuna í Vinnu- og handilsrásini á Rás2 í dag eftir klokkan 16.
















